Fiskimálaráðið

NORDEN2015.DK
VÆKST, VELFÆRD OG VÆRDIER - NORDISK MINISTERRÅD - NS - NBB

## Framløga av frágreiðingini um "Alt í Land"

Í sambandi við, at "Alt í Land" verkætlanin er liðug, bjóða vit, saman við Fiskimálaráðnum, áhugabólkum, løgtingslimum og fjølmiðlafólkum til eina framløgu av frágreiðingini **fríggjadagin 16. september kl. 14 hjá Østrøm í Havn**.

Verkætlanin varð sett í verk í juni 2015 í sambandi við danska formansskapin í norðurlendska ráðharraráðnum, har føroyska Fiskimálaráðið hevur ábyrgdina av evninum 'havtilfeingi'.

Endamálið við verkætlanini var at greina møguleikar og forðingar í mun til at gagnnýta alt tilfeingi úr fiskivinnuni í tøttum samstarvi við vinnuna.

Á fundinum verða niðurstøður og úrslit frá verkætlanini lagdar fram, umframt at umboð fyri vinnuna greiða frá ætlanum og íløgum fyri at fáa alt tilfeingið til lands. Síðan verður kjak um, hvussu komið verður fram á leið við at gagnnýta havtilfeingið í norðurlondum betur. Kunnað verður eisini um stuðulsmøguleikar frá Fiskivinnuroyndum.

| | |
|---|---|
| 14:00 | Vælkomin<br>*Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, bjóðar vælkomin* |
| 14:15 | Endamál og tilgongdin í verkætlanini<br>*Unn Laksá, granskingarverkætlanarleiðari, Syntesa* |
| 14:30 | Úrslit av virðisketu og áhugabólkagreiningum<br>*Ólavur Gregersen, stjóri, Syntesa* |
| 15:00 | Akraberg við ensilaguútgerð: Ein loysn fyri fjarleiðir<br>*Anfinn Olsen, Framherji* |
| 15.15 | Nútímans línuskipið: Ætlanir og avbjóðingar<br>*Kristian Martin Petersen, Sandshavið* |
| 15:30 | Framløga av tilmælunum frá "Alt í Land"<br>*Unn Laksá, granskingarverkætlanarleiðari, Syntesa* |
| 15.45 | Spurningar og kjak<br>*Ólavur Gregersen, stjóri, Syntesa* |
| 16:15 | Fiskivinnuroyndir: Stuðulsmøguleikar<br>*Eilif Gaard, formaður í stýrisbólkinum* |
| 16:30 | Endi og kaffi |

Spurningar kunnu setast við at venda sær til mín á telefon 233084 ella á unn@syntesa.fo.

Vónandi ber til hjá tær at luttaka.

Vinarliga

Unn Laksá

SYNTESA